# ítróttur

Nr. 220 • mikudagur • 16. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Súni hevur brotið beinið

**Eitt hendiligt óhapp undir venjing mánadagin hevur við sær, at tað verður ikki hugsingur um fótbólt hjá gøtumanninum hesu megin vetrarsteðgin**

**SKAÐI**
*Jákup Mørk*

Tað hevur annars gingið sum eftir ánni hjá Súna í seinastuni. Tilvenjingin í Aalborg hevur ikki gingið verri enn ilt, og seinastu nógvu vikurnar er hann vorðin ein alt meira týðandi partur av liðnum hjá AaB.

Men fyribils er tann týdningurin í øllum føurm minimeraður eina tíð, nú hann hevur brotið beinið.

- Hatta vóru øgiliga keðilig boð at fáa á sjúkrahúsinum. Men tað er ikki nógv, sum eg fái gjørt við tað, ljóðar tað úr telefonini í Aalborg.

*Hvat hendi, tá tú fekst skaðan?*

- Vit spældu dyst undir venjing, og sum so var talan um púrasta vandaleysa støðu. Ein í hinum partinum skal spæla bóltin, men beint áðrenn hann sparkar, prikið eg bóltin frá honum. Og so rakar hann beint í leggin á mær, greiðir Súni frá.

### Missir heystið

At verða skaddur er væl altíð nakað, sum kemur illa við hjá einum fótbóltsspælara, men hjá Súna var hetta nærum tað ringasta, sum henda kundi júst nú.

- Hetta var ræðuliga keðiligt. Eg havi veruliga kent meg vera væl fyri seinastu vikurnar. Eg eri byrjaður inni fleiri ferðir, og bæði spælarar og venjari hava verið øgiliga positivir mótvegis mær. Og at fáa dystir sum til dømis tann móti Brøndby, er jú heilt fantastiskt.

- Nú er seks vikur eftir at spæla í tríggjar vikur, áðrenn farið verður undir vetrarsteðgin, og tí eri eg heilt vísur í, at eg eisini hevði fingið spælitíð í hesum. Men ístaðin kann eg so bara fara at fyrireika meg til jólagávukeypið. Stórt annað er ikki at gera í løtuni.

*Hvussu langur verður steðgurin?*

- Tað ganga so einar 4-6 vikur, áðrenn eg kann byrja at venja aftur, og tá er heystið so farið. Í løtuni siti eg bara heima, men tað verði eg nokk troyttur av í longdini. So eg fari nokk at ragga mær út til onkra venjing og soleiðis. Eisini fyri at hitta hinar spælararnar. Men stuttligt er tað so undir ongum umstøðum júst nú, staðfestir skotsterki gøtumaðurin at enda.




*At tað er stutt frá tindinum og niður, mátti Súni Olsen ásanna týsdagin. Eftir at hava bitið seg fastan á AaB-liðið við fleiri framúr avrikum, skal hann ganga í gipsi í øllum førum fýra tær komandi vikurnar*

*Mynd: Scanpix*

## Poul er aftur í barndómsfelagnum

**Enn er ikki greitt, hvør skal vera venjari í Gøtu, har formaðurin hevur gott mót, tí hann heldur, at teir eiga at hava lært nógv av farna kappingarárinum**

**GÍ**
*Jóannes Hansen*

Poul Ennigarð er aftur í barndómsfelagnum í Gøtu. GÍ og Poul Ennigarð hava skrivað undir eitt ára samstarvsavtalu, sum ber við sær, at verjuspælarin í 2006 aftur fer at spæla við GÍ. Har hevði hann altíð spælt, inntil hann undan farna kappingarárinum fór til Fuglafirðar.

Poul fekk ikki høvi rættuliga at spíla seg út í Fuglafirði. Eitt skifti var hann skaddur, og tvey reyð kort - tey fyrstu sum hann nakrantíð hevur fingið - bóru fleiri daga leikbann við sær.

- Vit eru fegin um, at Poul nú aftur fer at spæla í gula og bláa GÍ búnanum. Vit rokna við, at hann verður góður styrkur, sigur Brandur Jacobsen, formaður í GÍ.




*Poul Ennigarð er nú aftur í GÍ, eftir at hann í fjør spældi við ÍF*

Enn er tað ikki greitt, hvør fer at standa á odda fyri GÍ liðnum næsta kappingarár. Krzystof Popczynski hevur verið venjari undanfarnu árini. Tá ið liðið stutt undan kappingarenda var í stórum vanda fyri at flyta niður, gjørdu Popczynski og GÍ nevndin av, at annar venjari skuldi finnast, og so stóð Petur Mohr á odda fyri liðnum síðstu og avgerandi umførini.

Umframt at fáa venjaraspurningin upp á pláss so arbeiða teir í Gøtu við at styrkja liðið eitt sindur afturat.

- Tað er góður møguleiki fyri, at teir, sum spældu við GÍ í ár, eisini fara at spæla við næsta ár. Vit arbeiða við at styrkja eitt sindur um liðið. Eitt nú er neyðugt hjá okkum at tryggja okkum ein málverja og so kanska ein nýggjan álopsspælara, nú Popczynski verður venjari í HB, sigur Brandur Jacobsen.

Í fjør royndu fleiri málverjar seg millum GÍ stólparnar. Serliga væl nøgdir vóru teir í GÍ við pólverjan Marcin Dawid, sum teir leigaðu í Sumba. Um tað er møguleiki fyri at pólverjin aftur komandi ár fer at verja GÍ málið, hevur GÍ formaðurin ongan viðmerkingar til í løtuni.

### Góður lærdómur

Sjálvt um teir í GÍ hugsa um og kanna, um tað ber til at styrkja liðið nakað, so heldur Brandur Jacobsen, at síðstu umførini í farna kappingarári vístu, at fólkagrundarlagið hjá GÍ er nóg gott at standa seg í fremstu røð.

- Vit vóru leingi illa sperdir, og vit vóru so tætt at beinleiðis niðurflytingini, sum tað ber til at verða, uttan at tað skal enda við niðurflyting. Tá ið liðið var so illa fyri, sum tað ber til at ímynda sær, vístu spælararnir og øll, sum vóru í felagnum og tóku á við GÍ, framúr hugburð. Eg eri sannførdur um, at hetta lærdi okkum, at einki kemur av sær sjálvum, og at tað loysir seg at arbeiða við søkini. Eg ivist einki í, at hetta var ein álvarslig áminning á okkum øll um, at hóast felagið í eina fjórðingsøld hevur verið millum tey bestu, so kemur einki av sær sjálvum, heldur GÍ formaðurin, sum er avgjørdur um, at GÍ ikki fer at spenna figgjarliga bogan út um tað, sum verður mett at vera ráðiligt.

- Tað ber ikki til, og royndirnar siga øllum, at tað fyrr ella seinni endar galið. Men vit kanna, hvørjir møguleikarnir eru, og so fáa vit at síggja, um tað fer at bera til at styrkja liðið við n‡ggjum spælarum.

Í fjør tóku veteranarnir Magni Jarnskor og Sámal Joensen eitt eyka tak fyri felagið, eftir at teir høvdu verið burturi frá eitt skifti, og tað er góður møguleiki fyri, at royndu menninir eisini næsta ár fara at teljast millum teirra, sum fara at kappast um plássini á besta liðnum.

- Vit høvdu fleiri ungar menn á liðnum. Royndirnar í ár fara at koma væl við hjá teimum og okkum øllum næsta ár, roknar Brandur Jacobsen, formaður í GÍ við.